
Bíggjar kommuna


Støddi: 34,50 kvm.
Markatal: 36
Íbúgvar: 80
Húski: 26

Bíggjar kommuna fevnir um bygdirnar Bø og Gásadal

Bygdarráðið:
Elias Petersen, form.,
Poul Niclasen og
Solberg Henriksen

Íbúgvaratalið síðani 1973 (1.1.)	
1973	68
1974	68
1975	66
1976	66
1977	73
1978	73
1979	75
1980	75
1981	77
1982	79
1983	83
1984	80





Tann avbera vakra kirkjan í Bø

ult tað er hjá gásadalsmonnunum, nú fjøllini verða gingin. Teir eru í mesta lagi tríggir mans í bygdini, ið kunnu fara á fjall, og tí er neyðugt at fáa fólk aðrastaðni frá. Hevði tunnilin verið, so varð hetta als ikki nakar trupulleiki.

Á seinastu grannastevnu varð viðtikið at skifta út í Gásadali og í Bø. Nógv uttanbíggjajørð er í Gásadali. Eitt nú eiga bíggjarfólk nógva jørð í Gásadali. Elias Petersen heldur fyri, at tá tunnilin er komin og útskift er, tá verða møguleikarnir fyri uppdyrking góðir.

Annars arbeiða bíggjarfólk í dag fyri tað mesta aðrastaðni. Eitt nú á ellisheiminum í Miðvági og á flakavirkinum í Sørvági.

Smoltstøð

Uppá fyrispurning um møguleikar eru at skaffa nýggj arbeiðspláss í eini bygd sum Bø sigur Elias Petersen, at teir helst eru ógvuliga smáir. Hann vísir tó á, at bygdarráðið hevur viðgjørt eina umsókn um loyvi at byggja eina smoltstøð til fiskaaling har í bygdini. Nakrir sørvingar hava spurt seg fyri hjá bygdarráðnum, um teir kunnu fáa loyvi at brúka Stóra, ið rennur oman gjøgnum bygdina, til ein smoltstøð.

Kommunan er ikki ímóti, at ein smoltstøð verður løgd har í bygdini. Hetta svar hevur hon givið umsøkjarunum.

Betri vegur

Hesi seinastu árini er eitt stórt arbeiði lagt í at bøta um vegasamband millum Bø og Sørvág. Vegurin er breiðkaður og betraður, soleiðis, at tað í dag bert tekur nakrar fáar minuttir at koyra úr Bø til Sørvágs. Eisini er landsvegur gjørdur omanfyri bygdina.


Elias Petersen sigur, at kemur tunnilin, og tað roknar hann við, so fer hesin vegurin at hava sera stóran týdning fyri bygdina.

Aftur í skúla í Bø?

Skúlin í Bø varð niðurlagdur fyri meira enn 20 árum síðani, men gásadalsfólk hava tó framvegis skúla í bygdini. Har er tó bert ein næmingur. Elias Petersen sigur, at børnini í Bø ganga í skúla í Sørvági, men tað er ynski hjá bygdarráðnum aftur at byrja skúlagongd í Bø. Hann heldur, at tað er ov dýrt at hava børnini í skúla í Sørvági. Hetta fer við umleið einum triðingi av figgjarlógini hjá kommununi.

Bygdarráðið hevur skrivað til landsskúlafyrisitingina um loyvi at sleppa at byrja skúlagongd aftur í Bø. Tað stendur annars í skúlalógini, at arbeitt eigur at vera fyri at hava børnini gangandi heima í skúla longst møguligt. Í dag ganga eini 15 børn úr Bø í skúla í Sørvági.

Hvat viðvíkir gamla skúlanum, so heldur Elias Petersen ikki, at hann er nýtiligur sum skúli í dag. Men teir hava so ein annan bygning, gamla Faxi, sum møguliga kundi verðið brúktur sum skúli.



Bygdarmyndin. Gásadalur í dag



Kalmar vitjar eitt av fjósunum í Bø